Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

17. januar 2024
Mál: 24/00047-2
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-066/2023

**Svar til § 52 a fyrispurning nr. 52-066/2023 frá Sólvit E. Nolsø, løgtingsmanni, til Dennis Holm, landsstýrismann, um vegin í Sandslíð**

**Spurningar:**

1. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin við vegnum í Sandslíð?
2. Er ætlanin at halda fast í tí, ið samferðsluætlanin leggur upp til?
3. Eru dagførdar kostnaðarmetingar gjørdar upp á loysnirnar í Sandslíð?

**Svar:**

**Til spurning 1 og 2**
Vegurin gjøgnum Sandslíð til eysturbygdirnar á Sandoynni er bygdur í 1920 - 21 og er ein av elstu vegum í landinum. Vegurin er ein 1,5 kilometrar langur, einbreytaður vegur. Dagliga koyra millum 400 og 500 akfør á vegnum.

Tað er neyðugt at dagføra farleiðina, og hava tvær ymiskar loysnir verið frammi.

Eftir íløguætlanini (vald loysn) verður vegurin gjøgnum Sandslíð dagførdur, har vegurin er til bygdirnar á eystursíðuni á Sandoynni. Har er lítil ferðsla, og mælir Landsverk til at víðka vegin til tvær farbreytir, og tryggja teinin móti omanlopum.

Í 2021 - 22 var játtan tøk til vegin, og er verkætlanin fyrireikað, prosjekterað og klár at bjóða út. Eftir íløguætlanini verður hendan verkætlanin gjørd í 2025 - 2026, og verða eftir ætlan 23 mió. kr. játtaðar í 2025 og 23 mió. kr. í 2026.

Hin loysnin við vegnum í Sandslíð er at breiðka verandi veg, umframt at gera ein stuttan tunnil uppá 380 metrar á Líðarenda, har vegurin er serliga trupul at breiðka.

P/F Suðuroyartunnil mælir til eina loysn, har Suðuroytunnilin gongur frá Skarvanesi til Sandvíkar. Tað merkir, at tað verður munandi meira og tyngri ferðsla í Sandslíð, um tann loysnin verður vald. Vegurin verður tá ein av høvuðsfarleiðunum í landinum við nógvari ferðslu.

Málið má tí takast upp av nýggjum, tí tað verður neyðugt við eini størri breiðkan, enn um vegurin bert er til eysturbygdirnar, og ein partur av vegnum í Sandslíð verður helst lagdur í ein tunnil. Best er ikki at seta arbeiðið at breiðka líðina í gongd, uttan so at mann í báðum førum ætlar at gera ta størru breiðkanina.

**Til spurning 3**
Fyrra loysnin, har vegurin í Sandslíð verður breiðkaður til ein tvíbreytaðan veg til at nøkta ferðsluna til eysturbygdirnar, var mett til 40 - 45 mió. kr. í 2021 prísum. Landsverk viðmerkir, at verkætlanin kann verða trupul at gera, tí tað er brattlendi í Sandslíð, og eigur tí at verða roknað við einum hægri váðaískoyti, soleiðis at samlaði kostnaðurin verður einar 50 - 55 mió. kr.

Um vegurin gjøgnum Sandslíð skal vera ein av høvuðsfarleiðum landsins, har vegurin verður breiðkaður, og stuttur tunnil gjørdur, vísir ein júst dagførd kostnaðarmeting, at verkætlanin kostar einar 107 mió. kr. við váðaískoyti.

**Dennis Holm**
*landsstýrismaður*